# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Arnbjørn formaður í Rithøvundafelagnum

**BÓKMENTIR**



Rithøvundafelag Føroya hevur havt aðalfund. Formaðurin seinasta árið, Heðin M. Klein, stillaði ikki upp aftur. Í hansara stað varð valdur Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð. Zakarias Wang varð afturvaldur í nevndina, Lydia Didriksen varð afturvald til 1. tiltakslim og Guðrun Gaard var vald til 2. tiltakslim. Hini trý í nevndini eru Carl Jóhan Jensen, Vida Akselsdóttir Højgaard og Marjun Syderbø Kjelnæs.

Nevndin skipaði seg á fyrsta nevndarfundinum eftir aðalfundin við Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð sum formanni, Carl Jóhan Jensen sum næstformanni, Vidu Akselsdóttir Højgaard sum skrivara, Zakariasi Wang sum kassameistara og Marjun Syderbø Kjelnæs sum nevndarlimi. Av tí at Marjun í løtuni býr í Danmark, hevur Lydia Didriksen tikið sæti í nevndini fyri hana.

Fráfarandi formaðurin Heðin M. Klein hevur verið nevndarlimur í Rithøvundafelagnum ymisk tíðarskeið, seinast frá 1991. Árini 1994-97 og 2006-07 var hann formaður felagsins. Nýggi formaðurin Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð er nývaldur. Hann hevur frá 2003 verið formaður í Bókavarðafelagnum.

Í Rithøvundafelagi Føroya eru umleið 100 limir. Felagið varð stovnað 24. mars 1957 og hevur sostatt fimti ára stovningardag í ár.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Rudolf Midjord**, ættaður av Tvøroyri, andaðist á Sankt Maria Hospis í Vejle 27. mars, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Jerlev kirke leygardagin klokkan 14.

**Mads Andreas Fitjar, Vestmanna**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 27. mars, 87 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju fríggjadagin klokkan 13.

**Anna Matras Madsen**, sjúkrasystir, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Sengeløse, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 24. mars, 75 ára gomul. Farið verður úr Højnæs kirke, Højnæsvej 60 í Rødovre, fríggjadagin 30. mars klokkan 12 í kirkjugarðin í Sengeløse, Landsbygaden 68, klokkan 13.30.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá okkara kæra

**Inger Enni**
Tvøroyri

andaðist og varð borðin til hvíldar.

Vit takka øllum, sum gjøgnum árini stukku
inn á gólvið.
Takk til prest, kirkjutænarar, gravara og sangarar.
Eisini takk fyri blómur, kransar og
stuðul til stovnan av eldrabýli.
Ein serstøk tøkk til Nærverk.
Somuleiðis takka vit øllum sum fylgdu.

*Vegna okkum avvarðandi*
**Tórur, Helgi og Birgir**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at elskaða kona, mamma, vermamma og
omma okkara

**Anna Elisabeth Matras Madsen**

sjúkrasystir,
ættað úr Klaksvík, búsitandi í Sengeløse

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 24. mars 2007,
75 ára gomul.
Farið verður úr Højnæs kirke, Højnæs 60 í Rødovre,
fríggjadagin 30. mars klokkan 12 í kirkjugarðin í
Sengeløse, Landsbygaden 68, klokkan 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Henning, Randi og Peter**

**Dagurin**
**29. mars. Jónas,** deyður umleið ár 326. Tikin av døgum í Persiu. Navnið merkir *dúgva* ella er kanska ein stuttur formur av Jóannes.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



## MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

